## Verdur smáar tvær milliardir

Svenski handilsbankin hevur gjørt metingar av kostnaðinum av Føroya Banka, og er komið fram til, at prísurin fyri allan bankan liggur einastaðni millum 1,6 og 1,9 milliard krónur. Hetta samsvarar væl við tað, sum formaðurin í Fíggingargrunninum frá 1992 hevði væntað. Eyðun á Rógvi sigur sambært Útvarpinum, at framtíðarmøguleikarnir og -ætlanirnar við Føroya Banka geva teimum eina vón um, at virðið á bankanum fer at vaksa í framtíðini.



## Altjóða áhugi í Føroya Banka

Altjóða íleggjarar hava sýnt stóran áhuga fyri Føroya Banka, og svenski Handilsbankin hevur góðar vónir um, at sølan fer at ganga væl uttanlands, sigur Útvarpið. – Serliga føroyingar, sum hava spart sær nakrar krónur saman, hava sýnt áhuga at tekna partabrøv í Føroya Banka, hevur Eyðun á Rógvi, formaður í Fíggingargrunninum, sagt við Útvarpið. Og hann sigur seg eisini hava vónir fyri, at útlendskir stóríleggjarar fara at seta pening í Føroya Banka. – Vit hava merkt stóran áhuga frá teimum íleggjarum, sum vit hava vent okkum til, sigur Jakob Fink frá svenska Handilsbankanum, sum er ráðgevi í sambandi við søluna.

# Fróði kannar streym gj

**- Nakað av svartkjafti var at síggja í føroyskum sjógvi, men lítið í íslendskum. Vestanfyri Føroyar stóð heilt fitt av sild og nakað av makreli, sigur Fróði Skúvadal, sum herfyri var umborð á íslendska havrannsóknarskipinum, Árna Friðrikssyni**

RANNSÓKNIR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Árni Friðriksson er bygdur í Chili í 2000. Hann er 70 metrar langur og stingur 7 metrar. Maskinan er 6000 hestakreftir, og skipið er útgjørt við øllum nútímans tólum*



Herfyri lá íslendska rannsóknarskipið Árni Friðriksson á Havnini.

Hetta er eitt rættiliga nýtt og væl útgjørt skip við øllum nútímans tólum.

### Stovnsmetingar

Árni Friðriksson kom inn at bunkra og skifta manning.

- Hesin túrurin var ein partur av altjóða stovnsmetingunum av svartkjafti í Norðuratlantshavi. Tá hesin túrurin var liðugur, og skipið skuldi sigla inn, vóru vit staddir einar 50 fjórðingar vestan fyri Føroyar. Tað sigur Fróði Skúvadal, sum var við rannsóknarskipinum fyri Fiskirannsóknarstovuna.

Ætlanin var upprunaliga at fara á Norðfjørðin í Íslandi, men av tí, at nógv styttri var at fara á Føroyar, valdi skiparin at bunkra og skifta manning í Føroyum.

### Ymiskar royndir

Á túrinum við Árna Friðrikssyni vóru nógvar ymiskar royndir gjørdar við flótitroli og ymiskum ristskipanum. Eisini vórðu streymmátingar gjørdar inni í trolinum.

Fróði Skúvadal er í holt við eina verkætlan, sum skal kanna, hvussu gjøgnumstreymingin er í flótitroli.

- Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við havrannsóknarstovurnar í Íslandi og Noregi og við Vónina í Føroyum.

Hann sigur, at á túrinum var nakað av svartkjafti at síggja í føroyskum sjógvi, men lítið í íslendskum. - Vestan fyri Føroyar stóð heilt fitt av sild og nakað av makreli, sigur Fróði Skúvadal.

### Hent tól umborð

Umborð á Árna Friðrikssyni hava teir tað, sum verður rópt ein ROTV, sum merkir Remotely Operated Towed Vehicle.

- Hetta "akfar" er útgjørt við fleiri videomyndatólum, ljósi og jetmotorum sum gera tað møguligt at stýra tólinum í sjónum, bæði upp og niður og til síðurnar.

Fróði sigur, at við hesum tóli ber til at filma tóv við eitt nú flótitrol - í fullum skala í tí umhvørvi, sum reiðskapurin skal brúkast.



*Sonevndi ROTV'urin (Remotely Operated Towed Vehicle) í sínum egna skúri. Rullurnar, sum siggjast, verða nýttar til at stýra tólinum í sjónum. Annars verður ROTV'urin tóvaður við einum kaðali og stýrdur av brúnni*




*Á brúnni fylgdu teir við, hvat fyrifórst niðri í sjónum. Ymiskar ristir vórðu royndar á túrinum, og her verður ein roynd í trolinum*